# GYSELIGT AT VERÐA KASSERAÐUR

HANN ER FLØGUAKTUELLUR VIÐ **FØSTUFRESSUM** AFTUR EFTIR **20 ÁRUM**. HANN ER **BERSØGIN** OG IKKI BANGIN FYRI AT **ÚTTALA** SEG. HANN HEVUR HAVT **FLEIRI** DAMUR OG ER **NARRAÐUR** EINAFERÐ. NÚ ER HANN **FALLIN** TIL Í NÓLSOY OG ER **NÓLSOYINGUR** VIÐ STÓRA **H**. OG SO HELDUR HANN, AT ØLL **MANNFÓLK** EIGA AT ROYNA EIN **TRÍKANT**, ÁÐRENN TEY **DOYGGJA**



**SAMRØÐA**
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Hann byrjaði longu frá heilt ungum at hava áhuga fyri tónleiki.

– Mamma flutti saman við Jóan Jakku Guttesen, sum spældi tónleik. Vit búði í einum lítlum kamari í Klokkaragøtu tá við atgongd til køk og WC, og Jóan Jakku flutti inn við gigantiskum bassforsterkara, gittara og bandupptakara, sigur Terji Rasmussen.

Lítla familjan hevði tað ógvuliga trongligt, men níggju ára gamli Terji gjørdist beinanvegin bergtikin av gittarspælinum hjá stjúkpápanum, og tað vardi ikki leingi, fyrr enn hann fekk Jóan Jakku at læra seg nøkur greb.

– Hann lærdi meg so eini fýrafimm greb, men tað var so eisini tað. Vinmenninir vóru longu byrjaðir at klimpra upp á gittar og tosaðu um, hvussu kool tað hevði verið at havt eitt orkestur, sigur Terji Rasmussen.

Sum sagt so gjørt. Tað var so skjótt, at eitt orksetur varð skavað saman og han var ikki meir enn 11-12 ára gamal, tá Rockboys var sett á stovn.

– Vit fluttu so yvir á Reyn har vit búðu í nokk so nógv ár í eini íbúð í Klettgarðinum. Eg fekk so eitt trummusett, tí nú skuldi eg verða trummusláari. Har var eisini trongligt, men hóast alt tvey rúm umframt ein lítil køkur. Eitt WC var eisini, men eingin brúsa, og niðri í gonginum stóð so trummusettið. Reynafrensarnir komu inn har og vóru vilt imponeraðir yvir øll instrumentini, og eg føldi meg sum ein kong. Og har byrjaði tað av álvara, sigur Terji Rasmussen.

## Sera aktivur

Nú var hann við til at stovna ein annan bólk, ið kallaðist Funkies. Og teir spældu so saman í nøkur ár.

– Vit spældu fyrstu ferð á Sandi í 1979, og so gek tað bara slag í slag. Vit spældu so at siga hvørt einasta vikuskifti, og vit vóru bara 14-15 ára gamlir, tá vit áttu útgeð fyri út móti 300.000 krónum. Tað var alt upp á borg og tað var ótrúligt, at tað gekk. Men Simme var lagaligur, og Alfred, sum hevði musikkhandil inni á Skálafjørðinum, var eisini sera lagaligur, sigur Terji Rasmussen.

Tá teir so góvust at spæla, var útgerðin mest at kalla útgoldin, so tað var ein rættiliga fitt upphædd í part, tá teir so seldu instrumentini.

Síðani tað hevur Terji Rasmussen verið nógv úti um seg innan tónleik.

– Vit góvu Terji og føstufressar út fyri 20 árum síðani, men ímeðan havi eg gjørt tvær fløgur við Moirae og tvær við Eyðun Nolsøe, og eg havi gjørt eina barnafløgu, Kettlingarnir, sum er nokk so apropos føstufressar, sigur Terji Rasmussen, sum eisini eitt tíðarskeið spældi við Frændum.

Nú er so Terji og føstufressar tvey komin á gøtuna, og meginparturin av løgunum eru komin í prosessini at framleiða fløguna.

– Eg hevði eini tvey løg liggjandi, og Leivur kom við enum og Arnold við einum øðrum, og hini eru so komin, meðan vit hava framleitt fløguna, sigur Terji Rasmussen.

Nú er skuffan so mest sum tóm, men Anker Eli Mortensen, ið hevur verið sangskrivari hjá Terja í mong Harrans ár, hevur eina rúgvu av tekstum liggjandi.

– Eg klári slett ikki at fylgja við har, sigur Terji Rasmussen.

## Endaði í Nólsoy

Í 2001 var Terji Rasmussen, sum tá búði í Keypmannahavn við unnustuni, Anniku, sum hann eigur tvær døtur saman við, í Føroyum. Tá var mest sum vónleyst at fáa børn inn á ansingarstovn, og tí var hann í Nólsoy at hyggja eftir einum húsum, sum tá stóðu til sølu.

– Mær dámdi tey húsini sera væl, men eg bjóðaði so ongantíð upp á tey, sigur Terji Rasmussen.

Tey bæði tosaðu so aftur og fram um, hvat frægast var at gera, og endin var so, at Terji setti seg í samband við barnaansingina í Nólsoy, og har var leyst og liðugt beinanvegin.

– Ikki bara kundu vit fáa døturnar inn á ansingarstovnin, men eg kundi eisini fáa arbeiði har, so tað kundi ikki verið betri, sigur Terji Rasmussen.

Tey tosaðu so um hetta aftur og fram, og meðan Terji hevði sera góðan hug at royna Nólsoy – í hvussu er eina tíð – so var daman eitt sindur meiri ivasom.

– Hetta fór ikki úr høvdinum á mær, so eg bleiv við at tosa um, »hvat við Nólsoy«, men tað var »tað visti hon ikki«. Hon var Havnarteys – akkurát sum eg, sigur Terji Rasmussen.

Tey samdust so um at royna tað, tey kundu jú altíð fara aftur til Havnar, um tað skuldi verið. Hann fekk arbeiði, døturnar sluppu í barnagarð, og hartil fekk hann so leiga eini hús.

– Tað var fínasta slag, tað var bíligt, so man kundi rættiliga koma fyri seg, sigur Terji Rasmussen.

## Narraður

Hetta var eitt hálvt ár framman undan, og ímeðan tey so bíða at flyta til Nólsoyar, fann hon sær so ein annan mann.

– So stóð eg har. Hon kom upp tað summarið, men hon gekk og vurderaði, hvat hon skuldi gera og hvar hon skuldi fara. Tað endaði so við, at hon valdi hin, og tey búgva nú niðri í Danmark við báðum døtrum okkara, sigu Terji Rasmussen.

Hann sigur, at man kann siga heldigvís í dag, valdi hon sær hin, sjálvt um tað ikki var so stuttligt akkurát tá.

– Tá ein tíð so var gingin, so kundi eg skiva ein lista við positivum tingum og negativum tingum, og tað vísti seg, at tann positivi listin gjørdist so ▶

MYND: ÁLVUR HARALDSEN